

*-Eg ivaðist ongantíð í, at eg gjørdi rætt. Tað er ikki stuttligt at fáa ábyrdgina fyri streymloysi. Men avgerðin, at vraka sáttmálan hjá maskinmeistarunum, var røtt, sigur Bárður Nielsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Lítið hugaligt

**- Tað er ikki serliga hugaligt at standa sum ábyrgdarpersónur fyri streymloysi, men eg ivist ikki í, at avgerðin, at vraka sáttmálan, var røtt, sigur Bárður Nielsen**

SAMRØÐA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Fyri einari lítlari viku síðani vrakaði Bárður Nielsen sáttmálan millum SEV og maskinmeistararnar.

Og síðani tá hevur landsstýrismaðurin skula lagt oyra til nógvar átalur. Summi fólk eru í øðini inn á landsstýrismannin, og onnur halda landsstýrismaðurin hevur gjørt tað rætta.

*Men hvussu er tað at fáa ábyrgdina av, at tað mesta av landinum liggur í streymloysi?*

- Tað er ikki serliga hugaligt at standa sum ábyrgdarpersónur fyri streymloysi, men eg ivist ikki í, at avgerðin, at vraka sáttmálan, var røtt, sigur Bárður Nielsen

Hann leggur eina við, at øll samgongan var samd um málið, og hann allatíðina hevur fingið fullan stuðul.

- So eg havi havt tað gott við mínari avgerð, sigur Bárður Nielsen.

Tað kemur heldur ikki óvart á landsstýrismannin, at nógv verður sagt og skrivað um hann seinastu vikuna.

- Sum landsstýrismaður mást tú rokna við hesum. Eg hugsaði meg væl um áðrenn, og eg hevði roknað við hesum fylgjunum. Men avgerðin var røtt, sigur Bárður Nielsen.

# Rokningin f

**- Vit kunnu ikki verða vælferðartænasturnar fyri uttan, og tað rinda vit prísin fyri í dag, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður**



BÚSKAPUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Fyri 43.000 krónur um mánaðin hevur Bárður Nielsen til uppgávu at stjórna føroyska búskapinum og halda skil á landsins inntøkum og útreiðslum.

Landsins fíggjarlóg hevur seinastu árini víst hall, og hall verður eisini komandi ár. Tónin úr fíggjarmálaráðnum er broyttur síðani vestmenningurin Bárður avloysti klaksvíkingin Karsten.

Vit hava sett fíggjarmálaráðharran stevnu fyri at venda kikaranum móti hansara fíggjarpolitikki og hugfrøði.

## Ongar marknaðarkreftir

Bárður Nielsen gjørdi bart og kolldømdi sáttmálan millum SEV og maskinmeistararnar. Grundgevingin var, at lønarhækkanin var ov stór. Landsstýrismaðurin leitaði eftir einari nullloysn, og harvið byrjaði tað at knípa við streyminum kring landið.

Vit hava í mesta lagi fjøruti minuttir í snotuliga umhvørvinum hjá fíggjarmálaráðharranum. Meira hevur hann ikki tíð til.

*Og hví er tað so týdningarmikið, at SEV ikki kann geva eina lønarhækkan. Tað merkir ikki størri útreiðslur til landskassan - men øktar skattainntøkur?*

- Støðan í búskapinum ger, at tað ikki ber til loyva nakrari munandi lønarhækkan. Fíggjarlógin gevur góðar tveyhundrað milliónir í halli í ár, og støðið verður tað sama komandi ár. Tað er snøgt sagt ikki rúm fyri nakrari lønarhækkan. Hvør einasta króna í øktum útreiðslum ger, at tað verður tyngri at reka samfelagið og neyðugt við enn størri sparingum, um landsins fíggjarlóg skal hanga saman, sigur Bárður Nielsen.

*Men tað kostar jú einki fyri landskassan?*

- Eg kundi verið líkaglaður og latið SEV siglt sín egna sjógv. Tað hevur eisini víst seg ferð eftir ferð, at hesin sáttmálin er við til at leggja støði fyri samráðingar á almenna arbeiðsmarknaðinum. Fakfeløgini eru so samantvinnaði, at tað ber ikki til at gera annað, sigur Bárður Nielsen.

Hann sigur, at verður lønarhækkanin á sama støði eftir samráðingar á almenna arbeiðsmarknaðinum i heystsum ætlaða lønarhækkanin hjá maskinmeistarunum hjá SEV, so merkir tað einar hundrað milliónir í meirútreiðslum fyri landskassan.

*Men er tað ikki at blanda seg út í marknaðarkreftirnar? Varð samráðst frítt, so burdi lønin tillaga seg eftir marknaðartretynum, og lønin vildi funnið eina "natúrliga" legu av sær sjálvum?*

- Eg vil kalla støðuna akkurát øvugt marknaðartreytum. Marknaðarkreftirnar eru langt síðani síðani settar út av spælinum. Vit hava hava normalløn, sum ikki broytist, tá tað eru ringar tíðir og heldur ikki broytist eins nógv og á privata arbeiðsmarknaðinu í góðum tíðum. Tað ger, at fólk tekkjast almenna arbeiðsmarknaðinum í ringum tíðum og søkja privata arbeiðsmarknaðin í góðum tíðum. Almenni arbeiðsmarknaðurin flytur seg ikki eftir marknaðartreytum og búskaparvøkstri.

## Ov stór hækkan

Tað, sum gongur aftur og aftur hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum er, at almennu útreiðslurnar eru voksnar ov nógv, og nú má táttast í. Tøl frá fíggjarmálaráðnum vísa, at lønarramman er hækkað við 24% frá 2000 til 2004. Samlaðu lønarútreiðslurnar á fíggjarlógini eru hækkaðar við 36% Sambært hagstovu Føroyar er brúkaraprístalið voksið við smáum fýra prosentum síðani 2001.

- Hetta hongur ikki saman við búskaparvøkstrinum. Vit kunnu ikki økja enn meira um útreiðslurnar. Tað er ikki forsvarligt. Upp á longri sigt er ein nulloysn nógv tann besta loysnin fyri samfelagið, sigur Bárður Nielsen.

Síðani 2002 hava bæði inntøkurnar hjá landskassanum og BTÚ so at siga staðið í stað. Hetta tulkar Bárður Nielsen til, at búskapurin er stagneraður.

- Vit mugu fyrihalda okkum til veruleikan. Tað er sjálvandi ringt at góðtaka, at vit eftir metstóran vøkstur nú hava ein búskap, sum er stagneraður, og hall á fíggjarlógini. Men tað er veruleikin, og honum kunnu vit ikki renna frá, sigur Bárður Nielsen. Hann heldur ikki, at undanfarna samgonga gjørdi neyðugar tillagingar á útreiðslunum, tá inntøkan varð skerd.

*Men tað ber ikki til bara at skjóta skylduna yvir á undanfarnu samgongu. Eitt nú eru tær fráboðaðu einskiljingarnar kundu í stóran mun skapt inntøkur til landskassan, men tær hava latið bíða eftir sær?*

- Jú, tað er rætt. Tað hevur gingið alt ov seint hjá okkum at fremja einskiljingar. Eftir mínum tykki skuldu fleiri av fyritøkunum verið einskildar fyri fleiri árum síðani, men politikkur hevur forðað fyri hesum, sigur Bárður Nielsen.

## Vælferðin kostar

Tann nógv umrøddi skattalættin, sum andstøðan hevur kallað asosialan, og stuðulin til rækjuvinnuna eru tiltøk, sum Bárður Nielsen kann taka undir við. Orsøkin er tann, at hetta merkir, sum hann sigur, at samfelagshjólini framhaldandi skulu mala og hugsast skal ikki bert um tað næstu fíggjarlógina - men upp á longri sigt, heldur landsstýrismaðurin fyri. Hesum eru tey langt frá øll, sum eru samd við honum í.